

*Fjarðastevnan verður sett á havnalagnum á Skála leygardagin klokkan 14*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Rodmundur Nielsen setir Fjarðastevnu

**- Eg fari at røða um ítróttin og tann sosiala týdning, sum hevur hevur fyri bygdasamfeløgini, og eg fari at røða um tann sosiala týdning tað hevur, at fólk hittast og kunnu leggja gerandisdagin til viks eitt bil, sigur borgarstjórin**

Fjarðastevna
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað verður Rodmundur Nielsen, ið fer at seta hesa fyrstu Fjarðastevnuna, sum verður hildin á Skála.

Fjarðastevnan er ein nýggj stevna, sum fyrstu ferð sá dagsins ljós í fyrraári. Hon skiftir annaðhvørt ár millum Skálafjørðin og Vestmanna – og á hvørji Fjarðastevnu telir kappróðurin við í FM-kappingini millum ymisku bátarnar.

Feløgini á Skála og Strondum hava gjørt av at skiftast um at hava stevnuna aðru hvørja ferð.

Tað verður Rodmundur Nielsen, borgarstjóri í Runavíkar kommunu, sum fer at seta stevnuna á Skála.

Hon verður sett á havnalagnum, leygardagin klokkan 14.

## Øll vælkomin

Rodmundur sigur, at hann í fyrsta lagi fer at bjóða øllum at vera hjartaliga vælkomin á stevnuna, bæði bygdafólki og avbygdafólki.

- Eg fari at røða um ítróttin og tann sosiala týdning, sum hevur hevur fyri bygdasamfeløgini, og eg fari at røða um tann sosiala týdning tað hevur, at fólk hittast og kunnu leggja gerandisdagin til viks eitt bil.

Borgarstjórin sigur, at hann fer eisini at røða um ta positivu byrjan, sum samanleggingin hevur fingið, nú Skála kommuna eins og Oyndarfjarðar kommuna og Elduvíkar kommuna saman við Runavíkar kommunu eru ein kommunal eind.

- Eg ivist onga løtu í, at skálafólk duga væl at skipa fyri eini góðari stevnu, tí tað hava tey gjørt í mong ár. Men hetta er so fyrstu ferð, at ein stevna verður á Skála, sum telir við í FM-kappingini millum kappróðrarbátarnar.



*- Eg ivist onga løtu í, at skálafólk duga væl at skipa fyri eini góðari stevnu, tí tað hava tey gjørt í mong ár, sigur borgarstjórin*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Meira burtur úr

Rodmundur Nielsen sigur, at soleiðis sum hann hevur skilt, ganga fyrireikingarnar til Fjarðastevnuna væl, og hann hevur eisini skilt, at skálafólk fara at gera meira burtur úr, nú stevnan telir við í FM-kappingini í kappróðri.

- Jú, eg vænti, at vit fáa eina góða Fjarðastevnu, um veðurgudarnir verða til vildar í vikuskiftinum, sigur borgarstjórin.

# Avgerðin hjá skálaf

**- Runavíkar kommuna røkkur nú heilt úr Æðuvík og norður til Elduvíkar, og eg haldi, at Skáli og Skálafjørður, sum liggja so sentralt í hesum øki, hava nógvar og góðar vakstrarmøguleikar – á ymiskum økjum og á ymiskan hátt, sigur Rodmundur Nielsen, borgarstjóri**

Fjarðastevna
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Skálafjørður liggur ógvuliga sentralur í nýggju Runavíkar kommunu. Økid*
*av innandurafótbóltshøll*

Rodmundur Nielsen, borgarstjóri í Runavíkar kommunu, sum nú eisini fevnir um Skála og Skálafjørð, heldur, at nýggja kommunan gongur einari ógvuliga spennandi tíð í móti, og hann ivast onga løtu í, at samanleggingarnar fara at gagna nýggju kommununi.

- Tað var stórur meiriluti bæði í gomlu Skála kommunu og Runavíkar kommunu at leggja saman. Fólk vóru ógvuliga positiv og vístu vilja til samstarv, og tað gera tey framvegis.

## Týdning fyri tilgongdina

Rodmundur heldur, at avgerðin hjá borgarunum í Skála kommunu og Runavíkar kommunu um samanlegging hevði sín týdning, tá ið fólk í Oyndarfjarðar kommunu og Elduvíkar kommunu seinni atkvøddu seg upp í Runavíkar kommunu.

- Tá ið Skála kommuna og Runavíkar kommuna kundu finna saman, hildu fólk í hinum báðum smáu kommununum ivaleyst, at so kundu tey eisini. Jú, eg haldi, at avgerðin hjá borgarunum í Skála kommunu hevði sín týdning í tilgongdini hjá hinum báðum kommununum.

Tá ið fólk í Skála kommunu fingu høvi at atkvøða fyri ella ímóti samanlegging, sluppu fólk í Runavíkar kommunu eisini at atkvøða, um tey vildu hava Skála kommunu upp í ella ikki.

- Í báðum førum var stórur meiriluti fyri samanlegging.

Rodmundur vísir á, at tá ið fólk í Oyndarfjarðar



*Nógv er bygt á Skála, men nú noyðist Runavíkar kommuna at útvega borgarunum nýggj byggiøki*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*